UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinnghúsveg 1-3
100 Tórshavn

Dagfesting: **28. juni 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-59**

Svar

upp á

fyrispurning frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, nr. 106/2019 eftir Tingskipanini § 52a Fyrispurningur viðvíkjandi kyni og útbúgving , settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu var kynsbýtið á ávikavist studentaskúlunum, handilsskúlunum, teknisku skúlunum og HF-skeiðunum í Føroyum fyri hvørt ár sær í tíðarskeiðnum 2010-2019?

2. Hvussu var kynsbýtið millum náttúruvísindaligu, handaligu, málsligu og hugvísindaligu fakini á miðnámi fyri hvørt ár sær í tíðarskeiðnum 2010-2019?

3. Hvussu fullu prógtølini á omanfyrinevndu fakum og útbúgvingum, skift á kyn fyri hvørt ár sær í tíðarskeiðnum 2010-2019?

4. Hvussu var kynsbýtið í 2019 fyri miðnámsfakini støddfrøði, evnafrøði, alisfrøði og lívfrøði á ávikavist A og B støði, og hvussu fullu prógtølini í somu fakum, skift á kyn?

5. Hvussu var kynsbýtið á teimum einstøku útbúgvingunum á Fróðskaparsetri Føroya fyri hvørt ár sær í tíðarskeiðnum 2010-2019?

6. Hvussu fullu prógtølini innan einstøku fakini á Fróðskaparsetri Føroya fyri hvørt ár sær í tíðarskeiðnum 2010-2019 skift á kyn?

Svar

Svar til spurning 1: Talva 1: Lutfallið av kvinnum á ymiskum útbúgvingunum í tíðarskeiðnum 2010-2019

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

%-partur av kvinnum á útbúgving										
Útbúgving	Kvinna 2010/11	2011/12	2012/13	2013/14	2014/15	2015/16	2016/17	2017/18	2018/19	2019/20
Kosmetikatstøðingur	100	-	-	-	-	-	-	-	-	-
Klædaatstøðingur	100	100	-	-	90	100	100	100	100	95
Yrkisnám hár	-	-	-	-	97	100	100	100	96	95
Heilsuhjálpari	96	95	96	99	100	97	95	94	98	98
Tilvirkisatstøðingur	-	-	-	-	86	86	100	100	93	100
Heilsurøktari	89	87	90	90	91	96	98	98	96	92
Hugbreyt	81	80	80	79	78	78	79	80	80	83
Fyrireikingarbreyt	64	59	64	74	77	73	75	77	75	72
Tilfeingisbreyt	47	58	55	71	60	54	50	58	76	74
FHS	58	53	60	57	55	57	58	52	53	42
Nátturubreyt	55	53	55	53	53	50	55	54	56	56
Matvøruútbúgving	54	54	-	-	45	33	58	40	56	45
Serflokkar	-	-	-	-	-	64	48	46	40	32
Búskaparbreyt	50	51	50	48	44	40	41	43	42	44
Tøknibreyt	26	26	26	20	18	19	20	27	32	37
Yrkisnám Bil	-	-	-	0	13	0	15	20	25	50
SIT	14	14	20	0	-	-	-	-	-	-
Yrkisnám Timbur	-	-	-	21	0	13	8	10	13	0
Yrkisnám metal	-	-	-	3	2	7	13	6	5	20
Yrkisnám el	-	-	-	-	5	6	4	2	2	3
Yrkisnám 4	-	-	-	-	0	0	7	0	-	-
Tilsamans	**57**	**56**	**57**	**61**	**59**	**58**	**59**	**60**	**62**	**61**

	Fleiri kvinnur enn menn lesa hesar útbúgvingar
	Áleið eins nógvar kvinnur og menn lesa hesar útbúgvingar
	Færri kvinnur enn menn lesa hesar útbúgvingar
-	Útbúgvingin ikki boðin út
*	Breytaskipanin byrjaði í 2013. Útbúgvingar eru knýttar soleiðis:
	Hugbreyt og málsligur studentur
	Nátturubreyt og matematiskur studentur
	Búskaparbreyt I og II og Hægri handilsskúla
	Tilfeingisbreyt og hægri próvtøku innan fiskivinnu
	Tøknibreyt og hægri próvtóku innan tøkni
	Fyrireikingarbreyt og HF

Dømi: Á Búskaparbreyt skúlaárið 2010/11 vóru 50% av teimum lesandi kvinnur

Kelda: Studni 2020

Háttur: Lesandi sum í skúlaárinum hevur móttikið lestrarstuðul í minst ein mánaða

Svar til spurning 2 og 3: Í dag hava vit ikki nakra megin umsitingarskipan fyri skúla- og útbúgvingarverkið. Skrásetingar eru, partvís manuellar, partvís í fleiri ymiskum skipanum á ymisku skúlunum og útbúgvingarstovunum. Trupult er at savna hetta tilfar saman, uttan at hetta krevur arbeiðsorku í fleiri mánaðir. Tí er ikki gjørligt at geva neyvt svar til allar spurningarnar í fyrispurninginum innan fyri tíðarkarmin, og hagtøl, sum lýsa kynsbýtið ella próvtøl býtt á kyn í ymisku lærugreinunum í tíðarskeiðnum, spurt verður um, eru ikki tøk.

Undirvísingarstýrið hevur sett arbeiðið í gongd, at fáa fullgóða skipan ella skipanir tilvega í skúlaverkinum, soleiðis at frameftir kann talgrundarlagið gerast munandi betur.

Svar til spurning 4: Talva 2 og 3 vísa kynsbýti og próvtøl í nevndu lærugreinum í 2019. Fyri tal av næmingum fevnir uppgerðin um yvir 90% av virkseminum, men fyri próvtøl fevnir uppgerðin um Glasir, Miðnám í Suðuroy og TSK. Havast skal í huga, at 3 ára gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar, har umrøddu lærugreinar kunnu lesast, fevna um í minsta lagi 9 próvtøkur, og næmingarnir fara ikki til próvtøku í øllum lærugreinum, teir hava. Miðal próvtal er ikki upplýst fyri tær próvtøkur, har 4 ella færri eru við.

Talva 2: Kynsbýti fyri ávísar lærugreinar á miðnámsskúlunum.

Lærugrein	Støði	Maður	Kvinna	Tilsamans	% Maður	% Kvinna
Alisfrøði	A	19	5	24	79,2	20,8
	B	88	111	199	44,2	55,8
Alisfrøði tilsamans		107	116	223	48,0	52,0
Evnafrøði	A	14	12	26	53,8	46,2
	B	67	78	145	46,2	53,8
Evnafrøði tilsamans		147	169	316	46,5	53,5
Lívfrøði	A	39	77	116	33,6	66,4
	B	37	93	130	28,5	71,5
Lívfrøði tilsamans		165	324	489	33,7	66,3
Støddfrøði	A	73	84	157	46,5	53,5
	B	130	192	322	40,4	59,6
Støddfrøði tilsamans		332	461	793	41,9	58,1

Kelda: Miðnámsskúlarnir.

Talva 3: Próvtøl í ávísum lærugreinum á miðnámsskúlunum í 2019 býtt á kyn.

			Próvtal			
			Maður		Kvinna	
Lærugrein	Støði	Próvtøka	Tal	Miðal	Tal	Miðal
Alisfrøði	A	Munnligt	17	7,4	1	-
		Skrivligt	26	4,3	4	-
	B	Munnligt	5	6,8	11	7,5
Evnafrøði	A	Munnligt	4	-	5	8,4
		Skrivligt	9	1,2	9	4,2
	B	Munnligt	21	4,7	15	10,7
Lívfrøði	A	Munnligt	5	11,6	10	9,6
		Skrivligt	21	5,3	32	5,3
	B	Munnligt	14	8,6	15	11,9
Støddfrøði	A	Munnligt	29	6,7	25	5,6
		Skrivligt	63	5,1	69	3,8
	B	Munnligt	12	1,8	26	7,3
		Skrivligt	28	3,5	42	3,1

Kelda: Miðnámsskúlarnir.

Svar til spurning 5: Kynsbýtið býtt á allar útbúgvingarnar seinastu 10 árini sæst á viðlagda skjali. Av teimum 938 lesandi, sum í løtuni eru skrásett sum virkin, so eru 627 kvinnur og 311 menn, sum í prosentum er 67% kvinnur og 33% menn. Hetta sæst aftur á nógvum av útbúgvingunum, har flest lesandi eru kvinnur. Summar útbúgvingar eru, har langt fleiri kvinnur enn menn eru á útbúgvingunum. Sum dømi kann bachelorútbúgvingin í sjúkrarøktarfrøði nevnast, har eingin maður er innskrivaður til lestur í løtuni. Eisini á bachelorútbúgvingini í námsfrøði eru frá 2010-2019 millum 81% og 97% av teimum lesandi á árgangunum kvinnur. Á nøkrum fáum útbúgvingum eru fleiri menn enn kvinnur. Sum dømi kann nevnast bachelorútbúgvingin í KT-verkfrøði, har yvir 90% av øllum árgangunum eru menn.

Svar til spurning 6: Fróðskaparsetrið liggur ikki inni við hagtølum yvir, hvussu próvtøl fella býtt á kyn. Kynið á teimum lesandi verður skrásett, men skipanin gevur ikki hagtøl yvir, hvussu próvtølini fella býtt á kyn. Hagtølini kunnu gerast manuelt við at farið verður inn at hyggja eftir hvørjum einstøkum próvtali. Talan er um hundraðtals próvtøkur frá 2010 til 2019 við væl yvir 5.000 próvtølum, so til ber ikki at veita hesi tøl innan svarfreistina. Mett verður, at hetta arbeiðið tekur einum fólki 6-8 vikur at gera. Arbeitt verður fram ímóti at betra um hagtalsframleiðsluna á Fróðskaparsetrinum, so neyðug hagtøl altíð eru til taks.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður